# Fundarbók hjá Eysturkommunu __________/_________ Síða
# 520 Leirvík

**Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig, skr.**

## Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2017 kl. 20.00.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

## Fundurin lokin kl. 00.00

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **17/00008**<br>**Umsókn um víðkan av brennistøðini IRF, matr. nr. 328b í Leirvík**<br>Ultimo desember 2016 móttók kommunan umsókn frá IRF um útbygging/víðkan av brennnistøðini. Víðkanin fevnir um móttøku av timbur, asbest, gips, jarn v.m.<br>Saman við umsóknini eru tekningar, frágreiðingar og kunning um, at arbeitt verður við góðkenning frá øðrum mynduleikum. Umsitingin hevur havt fundir við Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, og IRF hevur samskifti við Umhvørvisstovuna um Umhvørvisgóðkenning.<br><br>Kommunan/byggimynduleikin hevur viðgjørt umsóknina og verður málið lagt fyri býráðið.<br><br>Umsitingin mælir til at geva byggiloyvi og útskriva byggiloyvið, tá ið mynduleikar og tilbúgvingarleiðarin hava váttað, at víðkan av byggingini kann góðkennast.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva IRF byggiloyvi til víðkan av brennistøðini sambært umsókn, men byggiloyvið verður ikki útskrivað fyrr enn góðkenning er móttikin frá øðrum mynduleikum og tilbúgvingarleiðaranum. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |
| 2. | **17/00224**<br>**Marknaumskipan millum matr. nr. 359 og 361 i Leirvík til ummælis**<br>Umsókn er í sambandi við at Hebron hevur keypt matr. nr. 359, sum skal marknaumskipast og leggjast til matr. nr. 361.<br><br>Umsitingin mælir til at viðmæla marknaumskipanina.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla marknaumskipan millum matr. nr. 359 | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 00.00**

og 361 í Leirvík.

**3. 17/00225**

**Marknaumskipan millum matr. nr. 286 og 361 i Leirvík til ummælis**

Umsókn er í sambandi við at Hebron hevur keypt matr. nr. 286, sum skal marknaumskipast og leggjast til matr. nr. 361.

Umsitingin mælir til at viðmæla marknaumskipanina.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla marknaumskipan millum matr. nr. 286 og 361 í Leirvík.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**4. 17/00226**

**Marknaumskipan millum matr. nr. 272a og 361 i Leirvík til ummælis**

Umsókn er í sambandi við at Hebron hevur keypt matr. nr. 272a, sum skal marknaumskipast og leggjast til matr. nr. 361.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla marknaumskipan millum matr. nr. 272a og 361 í Leirvík.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**5. 17/00240**

**Uppskot um regluligan borgarafund**

Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen og Uni Rasmussen hava sett uppskot fram um, at Eysturkommuna skipar fyri einum regluligum borgarafundi um árið.

Jóhan Christiansen setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

*Skipa verður framhaldandi fyri borgarafundum eftir tørvi.*

Fyrst var atkvøtt um broytingaruppskoti, og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Árni Jacobsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo.

**Atkvøddi ímóti:**
Uni Rasmussen

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 00.00**

**Atkvøddi blankt:**
Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

Sostatt er broytinaruppskoti samtykt.

**6. 13/00070**
**Dagføring av bátahylinum í Norðragøtu**
Ástaðisfundur hevur verið um m.a bátahylin. Fleiri uppskot eru komin inn.

Ongin játtan er til dagføring av bátahylinum.

Vinnunevndin mælir til at neyvari kanningar, evt. simuleringar,av súginum í bátahylinum, verða gjørdar skjótast gjørligt. Herundir ynskir Vinnunevndin staðfest, um festið til bátabrúgvarnar, innast við fiskavirkið, skulu gerast.

Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini viðv. parkering, tó skal parkering úti á grótpirinum ikki útilukkast í verkætlanini enn.

Vinnunevndin mælir til at parkeringsloysnin á slættanum ml. Tollaksgøtu og Tróndargøtu verður framd sum skjótast, og at peningur møguliga verður fluttur av øðrum verkætlanum, sum ikki eru møguligar at útføra í inniverandi fíggjarári.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá Vinnunevndini, at gera neyvari kanningar, serliga viðv. súgvinum í bátahylinum. Umsitingin kannar hvat kostnaðurin er fyri, at gera simuleringar í bátahylinum og tíðarætlan til hesa kanning.

Byggi- og býarksipanarnevndin mælir til at gera parkeringspláss millum Tróndargøtu og Tollaksgøtu og biðja um eykajáttan uppá 600.000,00 kr. til hetta arbeiði.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 00.00**

Peningurin til arbeiðið viðv. parkeringsplássinum verður tikin av konto 6.38.11.511 Vegir
*(Løgujáttan)*

**7.** **17/00165**

**Ansingartøvur og framtíðar loysn í mun til hølir**

Í mun til ásettu normeringarnar á Brúsa og Gjáa, eru í dag ov nógv børn inni á stovnunum. Hetta er ikki ein nøktandi loysn í longdini og er neyðugt við eini loysn á trupulleikanum fram til nýggi stovnurin við Gøtugjógv stendur liðugur.

Tilmæli frá umsitingini fyriliggur, har m.a. mælt verður til at arbeitt verður við at útvega eina mobila eind.

Trivnaðarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá umsitingini, og at umsitingin kemur við eini kostnaðarmeting av eini møguligari mobilari eind, soleiðis at ansingartørvurin er nøktaður til nýggi stovnurin við Gøtugjógv stendur klárur at taka í nýtslu.

Á býráðsfundir tann 01. mai samtykti býráðiðfylgjandi:

*Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini, og harumframt at kanna aðrar møguligar loysnir.*

Umsitingin hevur kanna ymiskt í mun til aðrar møguleikar:

- Keypa mobila eind
- Seta á stovn dagrøkt
- Hýsa børnum í Frítíðarheiminum
- Keypa tænastu frá grannakommunu

Frágreiðing frá umsitingini fyriliggur.

Meirilutiní trivnaðarnevndini, Hans Mourits

Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum hjá Hjalta Dalheim.

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 00.00**

Foldbo og Brandur Jacobsen, mæla til at keypa mobilar eindir fyri at nøkta ansingartørvin. Minnilutin, Hanna Jensen, mælir til at seta dagrøkt á stovn og tekur endaliga støðu á býráðsfundinum.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 24/5-17 og setti Hjalti Dalheim fram soljóðandi broytingaruppskot.

*Eysturkommuna byggir út barnagarðin Brúsa við umleið 120 m2. Uppíbygningurin verður bygdur í sama sniði sum verandi Brúsi og staðsettur á verandi parkeringsplássi norðanfyri Brúsa. Garðurin kring Brúsa verður viðkaður, og portur verðir sett við innkoyringina til "gomlu" parkeringsplássini norðanfyri Brúsa.*

- *Mettur kostnaður verður kr. 3.000.000,-*
- *Bygningurin verður liðugur 1. august 2018*

Fíggjarnevndin tekur støðu til málið í býráðnum.

**8.** **17/00227**

**Dagføring av býar- og byggisamtyktini fyri Eysturkommunu við atliti at keypa jørð í Leirvík og Norðragøta**

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini tann 24. apríl 2017 var avrátt at fáa byggisamtyktina dagførda. Tað er umrøtt á fleiri fundum at endurskoða og gera broytingar í býar- og byggisamtyktini.

Umframt dagføring av býar- og byggisamtyktini mælir umsitingin til, at byrja upp á tilgongd við at keypa jørð, tí at hetta tekur langa tíð.

Eingin játtan er til hetta málið.

Umsitingin mælir til at byrja upp á tilgongdina í ár við at gera broytingar í býar- og

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 00.00**

byggisamtyktini, og miðja í móti at uppskot er klárt til støðutakan á vári/summar 2018.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at dagføra broytingar í Byggisamtyktini og at fáa játtan til tilgongdina í ár og í 2018.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanrnevndini.

**9. 17/00181**

**2. viðgerð av eykajáttanum mei 2017**

Á seinasta býráðsfundi tann 1/5-17 varð samtykt at veita eykajáttanir á íalt 413.500,00 kr.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við eykajáttanunum eins og samtykt við 1.viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**10. 16/00186**

**Hølir til endurvenjing (Nánd)**

Í sambandi við keypi av húsinum á matr. nr. 89 í Leirvík, til Nánd, bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 400 t.kr. til innrætting av hølinum.

Kostnaðurin at gera innrættingina av hølinum er mettur til 1,1 mio. kr. tískil er neyðugt við eykajáttan á kr. 700.000,00.

Trivnaðarnevndin vil hava lýst nærri, um fyriliggjandi uppskot er nøktandi uppá sikt. Endaliga støða verður tikin á býráðsfundi.

Fíggjarnevndin mælir til at arbeiðið verður gjørt sambært fyriliggjandi tekningum og at veita eykajáttan á 700.000,00 kr.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**11. 17/00133**

**Kloakkleiðing úti á Grógv í Syðrugøtu**

Málið var fyri á seinasta fíggjarnevndarfundi tann

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini um at taka

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 00.00**

25. apríl, tá eitt tilboð fyrilá. Fíggjarnevndin samtykti at umsitingin skuldi biðja um í minsta lagi 2 tilboð áðrenn støða var tikin í málinum, og er tað nú gjørt.

Tilboð og tilmæli frá umsitingini fyriliggja

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

av lægsta tilboðnum, sum er frá Kreton áljóðandi kr. 1.277.298,00 kr. u/mvg.

**12. 17/00200**

**Busssteðgipláss á Kráartanga í Leirvík**
Støðutakan til innkomin tilboð.

Tilmæli frá umsitingini fyriliggur

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 24/5-17 og tekur fíggjarnevndin støðu til málið á býráðsfundinum.

*Málið verður viðgjørt fyri aftulætnum hurðum.*

Eimælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingin,at taka av lægsta tilboðnum sum er frá Kreton á kr. 655.450.00 Peningurin verður tikin av konto 6.38.11.511 Vegir *(Løgujáttan)*

**13. 17/00013**

**Ljós til vøllin í Sarpugerði**
Á býráðsfundi tann 1. mai var málið tikið av skrá, tí at innkomin tilboð skuldi eftirkannast.

Málið er kannað og tilboð eftirkannað av ráðgeva

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka av tilboðnum frá ETV.

Meirlutin í fíggjarnevndini Jóhan Christiansen og Gudny Langgaard taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Minnilutin Hjalti Dalheim tekur støðu í býráðnum.

*Málið verður viðgjørt fyri aftulætnum hurðum.*

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og meirlutanaum í fíggjarnevndini. At taka av lægsta tilboðnum sum er frá El-talvuvirkinum áljóðandi kr. 1.311.456,00 kr. Peningurin verður tikin av konto 5.24.62.511 Ítróttaranlegg *(Løgujáttan)*

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Árni Jacobsen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo, Uni Rasmussen

**Atkvøddi blankt:**
Hjalti Dalheim

*Brandur Jacobsen og Tollakur Joensen vóru úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Hans Mourits Foldbo

**Fundurin lokin kl. 00.00**

**14. 16/00007**

**Nýggjur dagstovnur í Eysturkommunu**
Støðutakan til innbodnari arkitektapapping til nýggja dagstovnin við Døtugjógv.

Frágreiðing og tilmæli frá umsitingini fyriliggja.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, við tí broyting at tvey politisk umboð verða í dómsnevndini.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ____________________

Árni Jacobsen ____________________

Hanna Jensen ____________________

Gudny Langgaard ____________________

Tollakur Joensen ____________________

Hjalti Dalheim ____________________

Hans Mourits Foldbo ____________________

Brandur Jacobsen ____________________

Uni Rasmussen ____________________